# T Á OKKUM



**UMVÆLA**

*Hóast teir hjá BUISON serliga hava gjørt seg út til betongarbeiðið, taka teir eisini onnur arbeiði á seg. Næst á skránni er ein umvæling av kirkjuni í Árnafirði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**ROYNDIR**

*– Eg havi arbeitt sum timburmaður síðani 1972, og havi verið við til at byggja eini 120 sethús hesi árini, sigur Kristoffur Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Skjótt og væl gjørt

Millum ár og dag hava teir hjá Buison gjørt mong ymisk arbeiði. Eitt teirra var neystið hjá Árnafjarðar Kappróðrarfelagi í 2006.

Um hetta arbeiðið verður skrivað soleiðis:

“At tað hevur gingið skjótt við at byggja kappróðrarneystið í Árnafirði, kunnu øll vera samd um. Og onki kemur av sær sjálvum. Vit hava havt framúr góðar handverkarar.

Betongarbeiði gjørdi Kanjon. Kanjon byrjaði uppá betongarbeiði um mánaðarskifti juni/juli, og síðani fóru teir í feriu, og komu aftur til arbeiðis 21. august. Sjálvt um arbeiðið bleiv seinkað ein mánað, við at betongelementini vóru seinkað úr Íslandi, ja, so gekk arbeiðið ómetaliga gott.

Timburarbeiðið, innilokan o.a. gjørdi Buison. Buison kom á økið í oktober, og tað hevur verið buður í teimum líka síðani. Teir reistu 7. november, so tit kunna ætla at her hevur verið ein ótrúlig arbeiðsmegi, tí tann 21 desember var klárt at hava veitslu í neystinum við súpan og røstum kjøti.

(Kelda: arf.fo)